# Føroya Kærustovnur sóknast eftir sjúklingaráðgevum

Sambært nýggju psykiatrilógini, sum kemur í gildi 1. oktober 2009, skulu sjúklingaráðgevar tilnevnast í øllum førum, tá ið talan er um tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhald, tvingsilsviðgerð, tvingsilsfastspenning, nýtslu av likamligum valdi, verjufastspenning, nýtslu av persónligum alarm- og peiliskipanum og serligum duralásum, persónligari vernd, ið uttan steðg varir meira enn 24 tímar, umframt, at dyr á deildini verða læstar.

Í hesum sambandi søkja vit eftir persónum, sum kundu hugsað sær at verði sjúklingaráðgevar. Talan er ikki um fulltíðarstarv, men um at tú verður góðkendur sum sjúklingaráðgevi og tilnevndur, tá tørvur er á hesum.

**Uppgávur**
Uppgávan hjá tær sum sjúklingaráðgevi er at leiðbeina sjúklingin og geva honum ráð í øllum viðurskiftum í sambandi við innlegging, uppihald og viðgerð á psykiatrisku deild. Tú skal somuleiðis hjálpa sjúklinginum við at seta í verk og gjøgnumføra møguligar kærur, og um til ber, vera hjástaddur, tá ið kæran verður viðgjørd í sjúklingakærunevndini.

**Førleiki**
Serlig útbúgvingarkrøv eru ikki til at gerast sjúklingaráðgevi, men ynskiligt er, at tú í tínum starvi hevur innlit ella royndir, ið verða mett, at vera serliga viðkomandi. Tú arbeiðir kanska í heilsu- ella sosiala økinum. Tú ert kanska prestur, sálarfrøðingur, lærari ella á annan hátt serliga væl skikkaður at røkja uppgávuna sum sjúklingaráðgevi. Eingin starvsbólkur verður tó framman undan tikin fram um aðrar.

**Løn- og setanartreytir**
Føroya Kærustovnur finnur fram til og góðkennir sjúklingaráðgevarar og kunnar teir um psykiatrilógina og uppgávur teirra. Eitt yvirlit yvir góðkendu sjúklingaráðgevarnar verður síðan latið til Psykiatriska depilin, sum tilnevnir sjúklingaráðgevarnar í hvørjum einstøkum føri og eisini lønar ráðgevunum.

Samsýningin verður ásett í kunngerð av landsstýrismanninum í heilsumálum

**Umsóknir**
Freistin at søkja er 8. oktober 2009.
Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skulu sendast til:
Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postboks 45
110 Tórshavn

Áhugaði eru vælkomin at seta seg í samband við Beintu Festirstein, løgfrøðing á tlf. 320585 fyri at frætta nærri.

**Um stovnin:** Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Innlendismálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Kærunevndin í lendismálum, Vinnukærunevndina og frá 1. oktober 2009 eisini til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivstova hjá Skuldarumskipanarnevndini og Fjølmiðlanevndini. Á stovninum starvast í løtuni 7 fólk, stjórin, tríggir løgfrøðingar og trý skrivstovufólk.

# Fuglafjarðar Kvøldskúli
## Veturin 2009/2010

| Lærugrein | Tíð | Lærari | – tlf. |
|---|---|---|---|
| **Hondarbeiði** | | | |
| Broderíir -eisini til før. búnan | Má. 19.00 | Rutt Hansen | 444480 - 744480 |
| **Kreativ seyming** | Vikuskiftisskeið | Odvør á Lakjuni | 444440 - 268690 |
| *Vit seyma klæðir, tilhoyr, jólagávur og ymiskt til húsbrúk. Sjálvandi ber til at seyma úr nýggjum tilfari, men dentur verður lagdur á at endurnýta kovboybuksur, leðurjakkar, troyggjur o.a – at seta nýtt og gamalt saman á ein spennandi hátt.* | | | |
| **Modelsmíð** | Týskvøld | Ólavur Sjúrðarberg | 443192/737762 |
| **Trummur** | Tíð eftir avtalu | William Olsen | 594141 |
| **Fimleikur - Callenetice** | Várið 2010 | Áshild Kristiansen | 444621/580025 |
| **Hornblástur** | Hó. 19.00 | Kjeld Orseth | 228288 |
| **Harmonikuspæl** | Tý.19.00 – 22.30 Mi.19.00 – 22.30 | Óli Johannesen | 444333 - 214162 |
| **Blandað kór** | Má. 19.30 | Frits Johannesen | 444326 |
| **Máling og list** | Má. 19.00 | Høgni Thomsen | 257500 |
| **Føroyskt** Sum fremmant mál, f. norðurlendingar og enskt talandi | Tíð eftir avtalu | Jóannes Eliasen | 743344 –443018 |
| **Teldulæra** Windows grundskeið | Tý. 19.00 - 21.35 | Per Christensen | 445001 - 745301 |
| **Teldulæra** Word / Excel | Má. 19.00 – 21.35 | Per Christensen | 445001 - 745301 |
| **SRC(VHF)-skeið** uml. 30 t. | Tíð eftir avtalu | Steintór Jacobsen | 228210 |
| **Gittarspæl** – á byrjanarstigi | Mánadag | Bárður á Lakjuni | 595095 |
| **Tøving** | Tíð eftir avtalu | Unn E. Petersen | 224253 |
| **Svimjing** Ætlað menningartarnaðum | Hó. 14.30 | Andrea Eldevig | 593009 |
| **Bindiskeið** Fyri teg, sum vil læra at binda ella bara vil læra meir. Vit vera uppi á loft í Piddsahandli. | Mán. ella fríggjad. | Dagmar Beder | 444821/583583 |
| **Urtagarðsrøkt** | Týsdag | Jóan Petur Berg | 737722 |
| **Drama og sjónleikur** – Skeið fyri menningartarnað við Ega Dam | Tíð eftir avtalu | Mentanarhúsið | 234950 |
| **Frítíðarvirksemi fyri ung** Uppi á loft í Piddasahandli | Tíð eftir avtalu | | 737762 |

Skeiðini byrja eftir avtalu við læraran. Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum.
**Luttøkugjaldið er:** 200 kr fyri skeið styttri enn 40 tímar
400 kr fyri skeið 40 tímar og meir
og skal gjaldast beinanvegin, flytast á konto í peningastovnunum.
Luttakarar gjalda fyri tilfar.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**Tlf. 737762**



# Vakurleiki og vælvera

- Spa-viðgerðir
- Andlitsviðgerðir
- Kropsviðgerðir
- Makup-up, manicure og pedicure
- Fysiourgisk vøddamýking

**Restylane og Botox serfrøðingur vitjar 17. okt. - bílegg nú**

*Les meira á www.cosmeto.fo*

Cosméto
vakurleiki og vælvera

Niels Finsensgøta 38 • FO-100 Tórshavn • Telefon: 31 80 70 • www.cosmeto.fo

SUDOKU

# SEPTEMBER KAPPINGIN

Hvønn dag í september mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan fríggjadagin 2. oktober 2009 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður fyrstu vikuna í oktober. Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

Sudoku vinnari fyri august gjørdist:
**Signbrún Andersen,**
undir fossum 66, 700 klaksvík

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 8 | | | 4 | 9 | 1 | | |
| 6 | | | | | | 3 | | 2 |
| | | | 2 | | | | | |
| | | | | 2 | | | 9 | |
| | 7 | 4 | | 1 | | 8 | 5 | |
| | 3 | | | 7 | | | | |
| | | | | | 6 | | | |
| 8 | | 9 | | | | | | 1 |
| | | 1 | 4 | 9 | | | 3 | |

Cosméto
vakurleiki og vælvera

**Vinningurin hesaferð er frá Cosméto**

**Navn:**________________________
**Bústaður:**________________________
**Telefon:**________________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

Sosialurin